

# HENDURNAR UPP ELLA BUKSURNAR NIÐUR

## #6 Arnfríð Lutzen



**1. Kall ella Føroya Tele?**
- Føroya Tele

**2. Jolly ella Coca Cola?**
- Jolly

**3. Rás 2 ella Útvarp Føroya?**
- Útvarp Føroya

**4. Quality Street ella Roses?**
- Quality Street

**5. Siemens ella Nokia?**
- Nokia

**6. Loysing ella samband?**
- Loysing

**7. Flúgva ella sigla?**
- Flúgva

**8. Føroya Bjór ella Restorff?**
- Føroya Bjór

**9. Fótbóltur ella hondbóltur?**
- Fótbóltur

**10. Dimmalætting ella Sosialurin?**
- Sosialurin

**11. Tomat ella agurk?**
- Tomat

**12. Svart ella hvítt?**
- Svart

**13. Pizza ella grill?**
- Grill

**14. Fløgu, plátu ella band?**
- Fløgu

**15. Kaffi ella te?**
- Te

**16. Jakka ella frakka?**
- Frakka

**17. Lissur ella karalás?**
- Lissur

**18. Rock ella popp?**
- Popp

**19. Mamma ella babba?**
- Mamma

**20. MacIntosh ella PC?**
- PC

**21. Per ella Poul?**
- Pól

**22. Um tú vart ein bilur, hvat slag skuldi tú so verið?**
- Ein BMW

**23. Hvør skuldi so sloppið at koyrt teg, og hvør skuldi als ikki sloppið at koyrt?**
- Eg haldi, at familjan hjá mær skuldi sloppið at koyrt meg, men eg hevði ikki viljað havt Osama Bin Ladin at koyrt.

<ph_1>

**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76
100 Tórshavn
Tlf. 31 18 20
Fax 31 47 20
Teldupostur: ph_1@sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller

**Blaðstjórn:**
Ingrid Bjarnastein
Solby Anna Eliasen

<ph_1> er ein partur av Sosialinum annanhvønn mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Lýsingar til <ph_1> skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin áðrenn blaðið kemur út.

Lýsingarnar skulu ikki vera størri enn 254 mm breiðar og 70 mm høgar.

## Vit skriva:

Nógv hevur verið at hoyrt um, at ung undir 18 ár ikki hava nakað stað at fara til í fleiri av teimum størstu kommununum kring landið. Og tað hevur verið nógv skrivað um tað eisini. Og nógv hava eisini gjørt vart við teirra ónøgd við støðuna. Serliga tá tað kemur til dans. Og greitt er, at tað finnast fólk, sum veruliga arbeiða hart fyri at veita teimum ungu undir 18 ár eitt dansistað.

Tað eru tó ikki øll, sum so fegin vilja hava eitt stað at dansa í. Fleiri eru als ikki áhugað í hesum ítrivinum, um ein kalla tað eitt ítriv, og teimum, sum ikki dámar at ganga í dans, skulu jú eisini hava eitt stað at vera í. Og tað eru eisini nógv fólk, sum arbeiða hart fyri at veita teimum ungu, sum ikki ganga í dans, eitt stað at vera í, har ein kann koma saman til annað enn at drekka og dansa. Eitt ungmannafelag er til dømis fyri stuttum sett á stovn í Runavík, har ungdómur savnast nøkur kvøld um vikuna umborð á sluppini Høganes. Dentur verður eisini lagdur á, at hetta alt fer fram í royk- og rúsfríum umhvørvi. Spøl, videokvøld, hugnakvøld og annað er á skránni.

<ph_1> hevur hesuferð tikið tær andaligu brillurnar uppá. Vit hava verið og vitjað í Betesda í Klaksvík, har eini hundrað ung savnast hvørt leygarkvøld til hugnaliga samveru og til at hoyra Guds orð. Tveir ungir mans hava tikið stig til hetta, og hvørt leygarkvøld eru teir har saman við teimum ungu. Tey ungu sleppa at gera sum teimum lystir, meðan tey eru har. Møguleikarnir leygarkvøld eru nógvir, bæði við spølum og øðrum. Endamálið við hesu er at halda teimum ungu frá dansistøðum, alkoholi og øðrum, sum kann vera freistandi í tí aldrinum.

Ungdómurin í Filadelfia hevur nakað heilt annað at gera um vikuskiftini. Tey sita ikki inni og spæla spøl, men hvørt leygarkvøld eru tey úti á markini, har tey royna at koma í samband við fólk, sum hava tørv á andaligari føði. Tey eru úti í gøtunum, og býta ta sokallaðu »Jesus-suppuna« út tá dansistøð lata aftur um kvøldið - ókeypis. Hetta er ein annar háttur at koma út við Guds orði uppá. Ein góður gerningur, sum uttan iva vermir mangar kaldar sálir bæði so og so.

Fyrireikararnir, bæði teir í Betesda og í Filadelfia, eiga rós uppiborið fyri teirra arbeiði. Tað er ikki ein og hvør, ið tímur at brúka hvørt leygarkvøld til vælgerandi endamál, sum ikki hava peningaligan vinning við sær. Her má tað sannliga vera hugurin sum drívur verkið.

<ph_1>



Vangamyndin:



Rókur Jákupsson Jakobsen

# Tónleikur er nakað tú ert



Sum ungur tannáringur byrjaði Rókur Jákupsson Jakobsen í bólkinum Lokum, sum vit kenna við sanginum um apuna, Charlie. Í dag er hann við í bólkinum Tangz, sum millum annað hevur luttikið á Prix Føroyum við góðum úrsliti, og eisini hevur hann fyri stuttum sungið MC Hár í Prix Føroyar finaluna tann 26 apríl. Harafturat lesur Rókur samfelagsfrøði á Roskilde Universitetscenter

- Eg komi frá eini musikalskari familju. Pápi mín var við "Teimum á kamarinum", og vit hava altíð átt ljóðføri heima. Gittara og bass, og enntá mandolin og harmoniku, sigur 23 ára gamli Rókur Jákupsson Jakobsen.

Fyrstu ferð Rókur veruliga sang var við Lokum, tá hann var um 13 ára gamal.

- Byrjanin til Lokum var tá vit gingu í 7. flokki. Vit høvdu veitslur, og har byrjaðu vit at umyrkja sangir hjá øðrum, har vit settu stuttligar og frekar tekstir inn, greiðir ungi havnarmaðurin frá. Tutl skuldi um tað mundið geva út fløguna Rock í Føroyum 1, og tá varð eitt demo-band sent inn, og bólkurin fekk játtað at vera við.

- Trupulleikin var bara tá, at vit skuldu finna eitt navn. Vit opnaðu eina fremmandaorðabók, og tað fyrsta orðið vit komu á, var Lokum. Nú, sum eitt sindur eldri, dugi eg væl at síggja, at tað kanska ikki var eitt so gott navn, men gott er.

## Meira Svøríki

Eyðkendi klædnastílurin, har tónleikararnir veruliga hava gjørt nakað burturúr tí, teir eru í, kenna vit aftur. Talan er sjálvsagt um Tangz, mannað við fimm ungum monnum, sum allir gingu á studentaskúla í Hoydølum saman.

- Tangz byrjaði sum ein dansibólkur uppi í Hoydølum. Á studentaskúlanum eru jú nógvar veitslur, og tá skuldi onkur spæla. Og tað var faktiskt av hesum eftirspurninginum vit byrjaðu at spæla, fortelur Rókur.

Heystið 1999 var tað so ein, sum fann uppá, at tekna bólkin til Prix Føroyar, og tað var ikki fyrr enn í september mánað sama ár, at Rókur, Hallur, Halgir, Rói og Dánjal fóru at venja saman sum ein fastur bólkur.

Í 2000 fór Rókur undir at taka eitt støðisár í samfelagsfrøði á Fróðskaparsetrinum. Hetta árið vakti hansara áhuga fyri fakinum, og ætlanin var at taka alla bachelorútbúgvingina í Føroyum.

Men samstundis sum hesar ætlanirnar til, so sendu Rókur og Dánjal umsókn um at sleppa inn á ein tónleikaháskúla, og stutt eftir gekk leiðin til Svøríkis á skúlan.

- Tað var eitt fantastiskt ár har yviri, og eg skal siga fyri mín part, at mín ævintýrið í Svøríki er ikki liðugt enn. Eg fari at søkja inn har aftur einaferð, men nær tað verður, veit eg ikki, sigur Rókur.

Í løtuni ger Rókur útbúgvingina í samfelagsfrøði lidna niðri á Roskilde Universitetscenter í Danmark.

- Framtíðin er spennandi. Eg vóni, at hon fer at innihalda nógvan tónleik og nógva samfelagsfrøði. Í Føroyum kanst tú nokk ongantíð liva sum bara tónleikari, so eg giti, at tað verður samfelagsfrøðin, sum kemur at breyðføða meg. Í løtuni hevur tað akademiska eisini stóran áhuga.

Viðvíkjandi Tangz, sigur Rókur, at tað er als ikki lagt á hillina.

- Tíverri spæla vit ikki eins nógv longur, sum fyrr, tí tríggir av okkum lesa niðri, meðan tveir eru í Føroyum.

Men eitt er vist. Rókur ætlar sær til Føroya at búgva.

- Tað merkir ikki, at tá eg eri liðugur við útbúgvingarnar, at eg eri liðugur við heimin. Men eg ætli mær heilt vist at gerast ordiliga vaksin í Føroyum, sigur Rókur og flennir.

- Eg vænti ikki, at eg nakrantíð í lívinum fari at gevast við tónleikinum. Tað er ikki nakað, tú velur. Tónleikur er nakað tú ert.






**Navn:** Rókur Jákupsson Jakobsen
**Føðingardagur:** 16.07.1979
**Starv:** Lesandi
**Yndisorð:** Tórshavn
**Hvat vildi tú verða, tá tú vart stór, tá tú vart lítil?** Eg haldi, at eg bara vildi verða stórur! Nei, kanska tónleikari...minnist ikki!